Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

Súni í Hjøllum, skúlastjóri:

## 25 ára starvsdag



Nú nýggja skúlaárið byrjaði, hevði Súni í Hjøllum, skúlastjóri í Fuglafjarðar skúla, sín 25 ára starvsdag.

Súni tók prógv á Føroya Lærarskúla í 1979 og varð sama summar settur í starv sum lærari við skúlan í Fuglafirði. Skjótt gjørdist greitt, at við Súna hevði skúlin fingið ein sera góðan lærara, ið fekk góð úrslit og varð virdur og avhildin av næmingum og foreldrum eins væl og av sínum starvsfeløgum.

Í skúlanum fekk hann skjótt fleiri álitisstørv, og hann sat í lærararáðsnevndini í fleiri ár, eisini sum formaður eitt skifti. Tá táverandi skúlastjóri, Johan Ellendersen, fór í farloyvi skúlaárið 1985/86, varð Súni settur at røkja hetta starv. Eisini avloysti hann táverandi varskúlastjóra, Òla Jákup Jacobsen, tá ið hann hevði farloyvi skúlaárið 1987/88.

Tá ið Johan Ellendersen, skúlastjóri, legði frá sær í 1989, varð Súni settur sum skúlastjóri. Við sínum góðu evnum, hollu vitan og góðu útbúgving hevur hann røkt hetta álitisstarv fyrimyndarliga við hepnari hond. Hann hevur eitt sera gott fyrisitingarligt innlit og fylgir væl við, hvat rørist á tí fakliga økinum.Hann er álitandi og stundisligur í øllum sínum arbeiði, sáttligur og siðiligur í allari sínari medferð og er góður við sínar starvsfelagar eins og við skúlabørnini. Hetta verður eisini høgt virðismett av skúlastýrinum

Við sínum drúgvu royndum frá kommunalum arbeiði í Nes kommunu hevur hann lætt við at samstarva við Fuglafjarðar býráð og harvið fáa úrslit, ið gagna skúlanum. Á býráðsumsitingini er hann sera nógv avhildin fyri sítt skilagóða arbeiði, og tað fekk hann eisini eitt herðaklapp fyri, tá ið nýggja skúlalonin varð liðug fyri fáum døgum síðan.

Sum starvsfelagi fari eg at takka tær fyri gott samstarv og ynkjsa tær hjartaliga tillukku við 25 ára starvsdegnum. Eg ynski tær blíðan byr í komandi døgum!

**lærari**

## Sonny skipari á Norðlýsinum



*Kendi rokskiparin Sonny Johannesen, ið annars er skipari á trolaranum Enniberg, avloysti Birgir Enni á skonnartini Norðlýsinum, ið siglir við ferðafólki, meðan Birgir var kokkur á ONS oljuráðstevnuni í Stavanger.*

*Mynd: Sámal Bláhamar*

### Rætting

Rætting til minningarorðini um Jóhonnu Frederikka Høgnesen í Sosialinum leygardagin 28. august 2004.

Av misgáum kom navni Jóhanna, sum hon vanliga bleiv nevnd, at fella burtur. Vit biðja orsaka mistakið.

**Sosialurin**

## Stór rót

Leygardagin varð ein rót upp á 3,41 kg tikin upp í Sandavági

Hendan rótin varð tikin upp í einum garði í Sandavági leygardagin 2004. Hon vigaði, tá bløðkurnar vóru skornar av, 2,410 gram ella 2,41 kg. Bløðkurnar vigaðu 1,- kg, so samanlagt vigaði plantan 3,41 kg.

Sjey aðrar røtur vórðu tiknar upp hendan dagin. Tann minsta vigaði 400 gr. og tann størsta av restini vigaði 1,8 kg. Har vigaðu bløðkurnar 0,8 kg.

Alt í alt vigaðu hesar átta røturnar, 8,62 kg óflustar, men uttan bløðkur. Flustar vigaðu tær 8,2 kg.

Rótin er avmyndað saman við einum kvinnuhondbólti. Dystarbólti hjá 1. deild.



*Her er rótin avmyndað saman við einum hondbólti*

*Mynd: Edvard*

## Pallborð um vælferð

PALLBORÐSFUNDUR
*tíðindaskriv*

Nevndin fyri vælferðargranskingarætlanina undir Norðurlandaráðnum skipar fyri ráðstevnu í Føroyum um gransking innan sosial, heilsu- og arbeiðsmarknaðarviðurskifti í útnorðri. Í tí sambandi verður almennur pallborðsfundur í Klingruni í Norðurlandahúsinum fríggjadagin 3. september kl. 13. Við pallborðið verða norðurlendskir og føroyskir granskarar, umboð fyri vælferðargranskingarætlanina undir Norðurlandaráðnum og føroyskir politikarar.

Ráðstevnan er partur av einari 5 ára vælferðargranskingarætlan, sum Norðurlandaráðið setti í verk í ár 2000.

Á ráðstevnuni, sum er fyri innboðnum, luttaka granskarar, sum granska í sosial-, heilsu- og arbeiðsmarknaðarviðurskiftum og onnur við serligum tilknýti til hetta øki.

Endamálið við ráðstevnuni í Føroyum er at eggja til gransking í sosialum og heilsuligum viðurskiftum í útnorði við tí fyri eyga at skapa vitan um hvussu samfeløgini eru skipað, at gera samanberingar møguligar og harvið skapa eitt haldgott støði í orðaskiftinum um vælferðarskipanir og vælferðarpolitikk.

Pallborðsfundurin í Norðurlandahúsinum er almennur. Áhoyrarnir eru vælkomnir at seta fram spurningar og at gera viðmerkingar.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## 90 ár síðan Petur Háberg varð føddur

**Tað eru liðin 90 ár síðan røðarin, skaldið og rithøvundurin Petur W. Háberg varð føddur. Í sambandi við dagin verða bøkur og fløgur givnar út og sangløta verður í Ebenezer**

**Tíðindaskriv**

Petur William Háberg varð føddur í Havn 31. august 1914 og doyði 70 ára gamal 25. oktober 1984. Foreldrini vóru Poli Joensen, skómakari, ættaður av Selatrað, og Malla Petersen, ættað úr Geil í Havn.

Sum unglingi tók Petur ímóti Jesusi Kristi sum persónliga Frelsara sínum, og tráan hansara stóð til at vitna, tala, yrkja, týða og skriva um Harra sín.

Meðan tey ævigu virðini lógu fremst í lívi hansara, hevði hann eisini áhuga fyri máli, mentan og samfelagsviðurskiftum annars. Hann hevur lagt úr hondum fitt av bløðum og bókum. Hann stóð fyri nýggju útgávuni av Songbók Guds Fólks í 1976 og var ein av oddamonnunum fyri útgávuni av fyrstu føroysku Bíbliuni í 1949.

Á nýggju fløguni, sum ber heitið »Kom, sæla stund« eru 19 sangir, har Petur hevur yrkt 15 og týtt 4. Tey sum syngja eru: Ebenezerkórið, Dupultkvartettin, Tripletrioin, Ingálvur av Reyni, Sunneva Háberg, Petur Háberg Jacobsen, Brita á Váli Smith og Eli Smith, Ólavur og Jóannes á Váli, Siloakórið, Finnur Hansen, Frelsunarherurin í Havn, Tiðnað, Abbabørn og Anna D. Háberg. 8 sangir eru sungnir av nýggjum til hesa útgávuna sum er skipað sum tvífløga, har brot úr útvarpssending um Ísrael og 3 talur eru á seinnu fløguni.





*Mynd er av Peturi W. Háberg á fløguhúsanum á tvífløguni »Kom, sæla stund«*

Petur Háberg skrivaði eisini bøkurnar Søgur um Sangir 1 og 2, sum komu út í 1954 og 1979. Í sambandi við 90-ára dagin gevur forlagið Leirkerið í Gøtu hesar bøkurnar út av nýggjum, í einari bók.

»Ein sangur kann verða lýstur á nýggjan hátt og fáa eitt annað og størri virði enn frammanundan, tá ið vit fáa at vita sálarkenslur hansara, ið skrivað hann hevur, og umstøður, ið kunna hava eggjað til, at sangurin í heila tikið er vorðin til. Eisini kann vera forvitnisligt at vita hendingar og tilburðir í sambandi við ein sang, eftir at hann er komin fram og gerst lutur í tilveru menniskjans í ymiskum londum og skiftandi tíðum…« Soleiðis tekur høvundurin, Petur W. Háberg, sáli, til í fororðunum, hann skrivaði fyri fimmti árum síðani í bók síni »Søgur um sangir 1«.

Petur var ein hugfangandi røðari og bíbliuundirvísari og elskaði unga fólkið. Hann hevði stóran alsk til móðurmálið og vandaði sær altíð væl um tað, bæði í skrift og talu.

Zacharias Zachariassen á forlagnum Leirkerið, sigur soleiðis í formælinum til nýggju útgávuna: »Petur Háberg var okkum, sum yngri vóru, ein stór fyrimynd, og vit minnast hann við gleði sum hin eldhugaða talaran og framúrskarandi frásøgumannin í samkomum og útvarpi, serstakliga tá ið hann greiddi frá andaligum vekingum, hendingum og søgum um sangir«.

Í sambandi við dagin verður skipað fyri almennari kvøldsetu í Ebenezer týskvøldið 31. august kl. 20.00. Nógvur sangur er á skránni. Umframt kórið og onnur úr Ebenezer so verða eisini kórið í Frelsunarherinum og Finnur Hansen at hoyra.

Nýggja fløgan, sum ber heitið »Kom, sæla stund« kemur í fløguhandlarnar fyrsta dagin og kostar 189 kr. Bókin, »Søgur um sangir« verður send limunum í Bókaringinum hjá Leirkerinum fyrsta dagin, og verður eisini at fáa í bókabúðunum og kostar 250 kr.





*Í sambandi við 90-ára dagin gevur forlagið Leirkerið í Gøtu út bøkurnar Søgur um Sangir 1 og 2 av nýggjum, í einari bók*

## John fyllir áttati

Tað er eitt sindur torført at ímynda sær, at nú er John á Gørðum, svágur mín, 80 ár. Hann hevur ongantíð rættiliga verið typan uppá ein gamlan mann, lættur í sinni og skemtingarsamur sum hann er.

John er sonur Giddu og Jens Christian Simonsen, Jens Christian í Toft. Tey búsettust á Gørðum. John varð sum ungur sjómaður og sigldi m.a. við Atlantsfarinum, sum verfaðir hansara Jógvan hjá Billu átti saman við Kjølbro.

John var tó ikki leingi sjómaður. Hann legðist upp á land, tá hann giftist við Bodil, dóttir Annu á Nesi og Jógvan í Beiti í Lorvík. John fór at koyra bil heldur enn at baksast á sjónum.

Næstan øll árini síðani hevur John koyrt bil. Tey fyrstu mongu árini taxabil og síðani lastbil. Eitt skifti arbeiddi hann saman við beiggjanum Símuni á bilverkstaðnum, sum Kjølbro hevði á Biskupsstøð, og í nøkur ár var hann eisini á flakavirkinum á Kósini. Men John treivst ikki rættiliga, hevði hann ikki speedara undir fótinum.



Bodil og John búsettust eisini á Gørðum. Tey fingu 6 børn:

Jógvan (Egga) er giftur við Áslu, f. Klein. Tey eiga børnini Mary, Bjørg og John.

Kjartan er giftur við Sonju, f. Høgnesen. Teirra børn eru Elsa, Bjørn, Bodil og Erla.

Anna er gift við Kára Müller. Tey eiga børnini Heidi, Beintu, Lars, Jonny, Ann Kari, Mariu og Randi.

Elisabeth er gift við Árna Jacobsen, og tey eiga Alex, Jónu og Rana.

Unn er gift við Elfinni Tróndheim. Teirra børn eru Lisa, Joan og Bogi.

Bjørn var yngstur av børnunum hjá Bodil og John. Hann doyði av sjúku 7 ára gamal.

Bodil og John eiga 16 langommu- og langabbabørn.

Heimið hjá Bodil og John hevur altíð staðið opið fyri øllum, og mong eru tey, sum hava sitið væl har. Sjálvur búði eg hjá teimum í fleiri ár og treivst væl.

Við hesum fáu orðum ynskja Ása og eg John tillukku við 80 ára degnum 30. august.

**Finnbogi Ísakson**



MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

**Ringið tel 341800** Sosialurin

### Dagurin

**31. august. Berta.** Ókend halgikvinna. Summar halgisøgur siga, at talan er um ta vøkru Bertu, sum umvendi mann sín, kongin Edelbert í Kent í Onglandi.
Týskt navn, ið merkir *hin bjarta.*
*Janus Djurhuus doyði hendan dagin í 1948.*